# TÍÐINDI
# FRÁ
# RUNAVÍKAR KOMMUNUSKÚLA



*Á íslandsferðini vitjaði 8.b eisini Gullfoss*

**Oktober 2004**

## Inngangur.

Skúlaárið 2004/05 er longu skjótt 2 mánaðar gamalt, og er sostatt grundarlag fyri at hyggja at, hvussu støðan í skúlanum er.

Næmingatalið í løtuni er 506. Talið av flokkum er 24, umframt 3 flokkar við næmingum við breki. Í tímatalvuni eru 52 fólk. Øll arbeiða kortini ikki fulla tíð.

Skúlabygnaðurin er eisini eitt sindur broyttur, við tað at 4. flokkarnir, sum hava hildið til í Søldarfirði og í Rituvík, hetta skúlaárið eru á Glyvrum burturav. Hetta skyldast at næmingatalið í árganginum minkaði so mikið, at neyðugt var at leggja teir tríggjar flokkarnar saman í tveir. Ein samanlegging av flokkum er ongantíð ein ynskiloysn, men í hesum føri slapst ikki undan, og haldi eg samanleggingin er hepnast væl.

Seinasta ár helt tann eini flokkurin við brekaðum næmingum til í kjallaranum í Elim í Søldarfirði. Hesin flokkurin heldur nú til í gamla skúlanum í Lamba, sum er útbygdur og settur í stand. Í dag er hetta eitt sera vakurt og hugnaligt undirvísingarhøli.

## Nýggj starvsfólk.

Fleiri nýggj starvsfólk eru sett við skúlan hetta skúlaárið. Hans Toftegaard og Lena Jacobsen eru sett í føst størv. Hans, sum var liðugur á Føroya Læararaskúla í summar, undirvísir í Runavík í m.a. í smíð og ítrótti. Lena, sum hevur verið lærarai í Leirvík í nógv ár, hevur umframt lærara-útbúgving eisini útbúgving sum serlærari. Lena starvast bert við næmingum við breki. Guðrun Hansen, sum hevur verið lærari í Gøtu í fleiri ár, eins og hon eisini hevur undirvíst í Danmark, er sett í tíðaravmarkað starv. Guðrun hevur tímar á Glyvrum og í eini serstovu. Noomi Reinert, sum fekk prógv í summar frá donskum læraraskúla, er eisini sett í tíðaravmarkað starv. Noomi undirvísir á Glyvrum og í Runavík. Í samband við at tveir næmingar av Skála ganga í tí einu serstovuni í Søldarfirði, kemur Hallgerð Jacobsen, sum annars er sett sum lærari á Skála, yvir til Søldarfirðar at undirvísa í serstovuni 10 tímar um vikuna.

Í serstovunum eru eisini onnur nýggj andlit. Fríða Johannesen og Sunnleyg Rasmussen, sum báðar eru ergoterapeutar, eru settar sum stuðlar av Sernámsdeplinum. Eisini Elin Olsen, sum er sjúkrarøktarfrøðingur, er nýggj. Hon er fyri Lív Joensen, sum er í burðarfarloyvi.

## Foreldrafundir.

Eins og undanfarin ár er ætlanin at boðsenda foreldrunum minst tvær ferðir í skúaárinum til kunning á skúlanum. Fyrra ferðin er áðrenn heystfrítíðina, og tá er talan um felags foreldrafundir, har kunnað verður um hvørjar ætlanir læra-

rarnir hava við flokkinum, og hvørjar ætlanir hvør lærari hevur í síni lærugrein. Í november/desember er ætlanin at hava foreldravið-talu við eitt og eitt foreldur, har foreldrini hava møguleika til at tosa við hvønn einstakan lærara um júst teirra barn.

**Seturskúlar.**
Skúlin hevur valt, at 4., 6. og 8. flokkur skulu á seturskúla. 6.A og 8.B valdu at fara teirra túrar longu í august. 6.A var saman við Miriam vesturi í Vágoynni, meðan 8.B var í Íslandi saman við Jóhan og Maritu.
Íslandstúrurin, sum eisini var teirra seturskúli, varð stuðlaður av Fitur, ið er ein grunnur, sum letur stuðul til skúlaflokkar í Føroyum og Íslandi at ferðast fyri, fyri at ung í báðum londunum skulu kunna læra grannatjóðirnar betur at kenna – bæði landafrøðiliga og mentunnarliga.
Okkara flokkur lat sera væl at ferðini, og vitjaðu tey fleiri av kendu støðunum í nærheitini av Reykjavík.Nevnast kunnu t.d. Tingvallir, Gullfossur, Geysir o.a.. Eisini royndu tey seg á hestbaki, tá ríðing má sigast at hoyra til íslendsku mentanina. Tey búðu á einum vallaraheimi í útkantinum í Reykjavík og lærdu sostatt eisini sjálvan býin at kenna.
Slíkir túrar – og seturskúlar sum heild – eiga avgjørt ikki at undirmetast. Eru teir væl fyrireikaðir, eru teir fakliga sera gevandi, og teir eru altíð ein stórur vinningur fyri samanhaldið í flokkinum og millum næmingar og lærarar. Tí kann sigast, at hóast seturskúlarnir kosta nógv, so eru hetta væl givnir pengar.

**Jóhan T. Davidsen.**




Hósdagin 30. september kl 15.00 bjóðaði leiðslan í NSÍ til tíðindafund í hølinum hjá NSÍ. Orðsøkin var, at ein av okkara næmingum skuldi undirskriva lærlingasáttmála við enska stórfelagið Everton. Sáttmálin er fyri 3 ár fyribils. Næmingurin er Jóhan Troest Davidsen, sum hevur gingið í 10. flokki.
Jóhan, sum bert er 16 ár, hevur líka frá tí hann var heilt lítil víst sera góð fótbóltsevnir. Men bara evnir er ikki nóg mikið til at koma hagar, Jóhan er komin í dag. Hann hevur víst góðan vilja og hevur verið til reiðar at ofra seg – nýta frítíðina til venjing, og at tilrætta-

leggja allan sín livihátt, so hann svara til krøvini til ein rættan ítróttarmann.
Jóhan hevur skrivað sáttmála við Everton, men á fundinum varð upplýst, at talan líka so væl kundi verið okkurt annað stórfelag í onkrum øðrum landi. Fleiri feløg høvdu lagt merki til Jóhan og hansara fótbóltsevnir og vóru áhuga í at fáa hann sum spælara. Hetta sigur ikki so lítið.
Upplýst var eisini, at ein dag um vikuna skal Jóhan ganga í skúla. Stóru feløgini í Onglandi leggja stóran dent á at fyrireika sínar spælarar til eitt vanligt lív aftaná teirra fótbóltstíð. Tí verður eisini kanna hvussu teirra næmingar eru fyri, tá talan er um skúla og almenna vitan. Eisini hesa royndina hevur Jóhan staðið.
Bæði Ábraham Løkin og Jógvan Martin Olsen, sum hava vant Jóhan, mettu hann at vera eitt virðiligt umboð fyri NSÍ, nú hann fer avstað. Tað sama kunnu vit siga. Jóhan er eitt virðiligt umboð fyri okkara skúla, sum vit eru stolt av, og vit ynskja honum blíðan byr. Vit ynskja fyri hann, at tað má gangast honum væl við fótbóltinum, at hann fer at trívast, og at hann fer at finna sær góðar og positivar vinir í nýggja umhvørvinum.
Á fundinum vóru allir hansara vinir frá NSÍ og frá skúlanum. Ongin ivi er um, at Jóhan hesa løtuna var teirra stóra fyrimynd, og at teir og vit øll fara at fylgja væl við, hvussi honum fer at gangast.

**Annað.**
Sum kunnugt, so hevur skúlin í Runavík ikki havt nakað útiøki, sum næmingarnir hava kunnað spælt bólt á í fríkorterunum. Her bleiv nakað gjørt í summar. Eitt øki sunnanfyri skúlan - á stødd við ein honbóltsvøll - er asfalterað, og tá mál verða sett upp kann sigast, at ein bati er hendur her. Fyrr í summar varð rættiliga nógv gjørt omanfyri skúlan í Rituvík. Peningur er eisini játtaður til at bøta um umstøðurnar í Søldarfirði og á Glyvrum. Eisini er peningur játtaður til at asfaltera spælistykkið uttan um skúlan í Lamba.
Fyrireikingarnar til at byggja ein nýggjan skúla í Runavík heldur fram. Fyrstu skitsurnar er gjørdar, og fyrireikingarnar til at fara undir prokjektering av fyrsta byggistignum eru komnar væl ávegis. Slíkar fyrireikingar taka langa tíð, og helst mugu vit brynja okkum við toli nakað afturat, áðrenn vit síggja nakað stórvegis henda.

**Heystfrítíðin.**
Eins og vanligt hevur verið seinastu nógvu árini, so verður árligi rennidagurin hjá øllum skúlanæmingum í landinum fríggjadagin áðrenn heystfríðina. Í ár verður hann 8. oktober, og heystfrítíðin byrjar leygardagin 9. okt.. Farið verður aftur í skúla mánadagin 18. okt.
Góða heystferiu.